# Makkarin hjá Dollanum varð hongdur av bretum!

**Í hesum parti av frásøgnini um Daniel J. Danielsen frá hansara virksemi í Congo eru fleiri frásagnir í samband við ferðina saman við Casement, sum fekk eina heilt ótrúliga lagnu. Aftaná Congo varð hann heiðraður við aðalsheiti av somu bretum, sum í 1916 hongdu hann! Afturkomin til Bretlands er Daniel í fyrstu røð í herferðini, sum at enda fellur Lepold kong í Congo**



*Hendan myndin av Dollanum og Linu varð tikin, beint áðrenn tey fóru niður til hansara sjúkraviðgerð í juli 1916, sum hann doyði í oktober*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**3. partur**

## Avkvetta hondin hjá Epondo

Sum eitt meira útgreinað dømi um, hvat ið Casement saman við Daniel kom út fyri, skal verða greitt frá einum degi á ferðini, sum tað er greitt rættuliga væl frá. Hetta er 7. september 1903, tá ið tað nærkast endanum á ferðini og teir eru á veg oman eftir Congoánni.

Í sjálvari dagbókini verður sagt um hendan dagin:

*Fór til Ekansa við Armstrong og D(anielsen). Ræðuligur standur.*

Tað verður sagt frá teirra ørindi í einum undirskjali til sjálva frágreiðingini, har greitt verður frá støðuni í ymiskum pørtum av rutuni hjá Casement. Her eru vit komin til Bonginda, sum júst er heimabeitið hjá Daniel. Her var ein av missiónsstøðunum hjá Balolo missiónini, har hann arbeiddi saman við seinni umrødda Armstrong.

Bonginda var ein miðdepil fyri gummídnaðinum, har støðan var eina ringast, og tí hevur Daniel góðan kunnleika til umstøðurnar.

Teir fara frá missionsbátinum niðan eftir ánni í eini kano til eitt pláss, sum var um 8 míl frá Bonginda. Her drógu teir kanoina á land. Frá áarbakkanum vóru einar tvær míl til gongu.

Casement greiðir frá: "Frá nær og fjar koma fólk at biðja meg um at hjálpa teimum. Tey mundu vera eini 100, sum vóru offur fyri ymiskan harðskap. Eg var knappliga hildin uppat at vera konsul, sum ferðaðist í einum fremmandum landi. Nú var eg blivin ein kanningarleiðari fyri kriminelt virksemi".

Eitt av hesum málum var tað hjá Epondo, sum er ein góð einstøk lýsing av viðferðini av fólkinum. Her skal vera endurgivin ein samandráttur av tí, sum í frágreiðingini verður kallað Epondo sakin:

"Her fann eg ein vaktarmann hjá La Lulanga Kompaníinum og ein hóp av innføddum. Eftir eina løtu kom ein drongur um 14 ára gamlan. Um vinstra arm hevði hann ein skitnan klodda. Tá ið eg tók kloddan av, sá eg at vinstra hondin var kvett av, og at tað vóru merkir av skotum longri uppi á forarminum. Drongurin segði, at hann kallaðist Epondo. Hann greiddi frá, at ein vaktarmaður hjá nevndu fyritøku hevði kvett hondina av honum.

Eg royndi saman við teimum innføddu at finna fram til hendan mannin, og tað eydnaðist at fáa hendur á honum, sum hann gekk í bygdini við eini byrsu. Síðan setti eg Epondo framman fyri hann, og Epondo legði vaktarmannin undir at hava løstað seg. Høvdingurin í bygdini var eisini til staðar og stuðlaði hesi útsøgn. Vaktarmaðurin, sum kallaði seg sjálvan Mbilu, og av øðrum varð kallaður Kelengo, kundi ikki svara hesum ákærum. Hann royndi veikt at geva øðrum vaktarmonnum skuldina. Hann segði, at vaktarmaðurin undan honum hevði kutað nógvar hendur, og at tað helst eisini var hann, sum hevði gjørt seg inn á Epondo.

Tey innføddu, sum sótu har umkring søgdu, at tað vóru tveir aðrur vaktarmenn í býnum, men teir vóru ikki so ringir sum Kelengo, sum teir søgdu vera eitt illmenni. Tað vóru eisini fleiri onnur sum greiddu frá hansara illgerðum. Millum annað, at hann hevði bundið konuna hjá einum teirra uppí eitt træ og ikki slepti henni leysa, fyrr enn hann fekk eitt loysigjald.

Kelengo royndi at skáka sær undan við at tosa uttanum, men her var talan um eina so greiða vitnisførslu frá so mongum vitnum í bygdini, at eingin ivi var um, hvør ið syndarin var.

Undir hesi avhoyring var Daniel til staðar saman við trúboðarafelaganum W. D. Armstrong, og teir báðir skrivaðu undir rættleikan av avhoyringini. Sum lokalkendur kundi Daniel eisini vera við til at geva sítt íkast til hesa avhoyring, tá ið ivamál var um tíðarfesting.

### Eitt serligt eftirspæl

Júst henda frásøgn fekk ein serligan leiklut í tí, sum seinni hendi. Longu áðrenn frágreiðingin kom alment fram, royndi fólkið hjá Leopold at undirgrava trúvirðið á henni.

Casement hevði tikið Epondu við til nærmasta embætismann, har hann ákærdi vaktarmannin. Men embætismaðurin setti ein almennan dómara at kanna málið, og hesin hevði fingið Epondo at taka ákæruna aftur. Nú var søgan tann, at drongurin var bitin av einum villsvíni, og at kolbrandur var komin í hondina, sum so mátti takast av.

Hetta varð nýtt sum grundarlag at sáa iva ikki bert um hesa frásøgn, men um frágreiðingina hjá Casement sum heild.

Men hetta góðkendi Casement als ikki. Hann vísti millum annað á, at Epondo hevði greitt sár frá skotvápnum.

Bretska uttanríkisráðið gav



*Roger Casement á ferð síni í Congo*